# Handilslærlingur

Vit sóknast eftir lærlingi til VHS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi yrki, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

Vit vænta at tú ert røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hetta er ikki ein treyt.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, fríggjadagin 10. juni 2005.

Eru spurningar eru tygum altíð vælkomin at ringja tlf. 312000.

**pf Maria Poulsen & Co.**

Box 182
FO-110 Tórshavn

# Føroya Fótbóltsskúli

**Fótbóltssamband Føroya skipar aftur í ár fyri fótbóltsskúlum kring landið**

***Skúlarnir eru fyri børn í aldrinum 8-14 ár***

*Í ár verða skúlarnir tríggir í tali:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24. juni 2005 | kl. 13.00-18.00 | 25. juni 2005 | kl. 10.00-16.00 í Sandavági |
| 24. juni 2005 | kl. 13.00-18.00 | 25. juni 2005 | kl. 10.00-16.00 í Tórshavn |
| 07. juli 2005 | kl. 13.00-18.00 | 02. juli 2005 | kl. 10.00-16.00 á Toftum |

Tá skúlarnir enda, fáa børnini eina T-shirt, sum Føroya Banki hevur latið, eina Sisu-sodavatn, ið Føroya Bjór hevur latið, og góðgæti, ið P/F Kjølbro heilsølan hevur latið. Somuleiðis fáa tey prógv og ein fótbólt.

Tilmeldingarbløð verða løgd út til feløgini, á posthúsini og fólkaskúlarnar kring landið. Tað ræður um at bera skjótt at við tilmeldingini, tí luttakaratalið verður avmarkað. Tilmeldingarfreistin er annars 10. juni 2005

1979

**Fótbóltssamband Føroya**

Sosialurin 341800

# Rudding

Miðvágs Kommuna hevur sett sær fyri, at bilvrak, akfør, úthús og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu beinast burtur og latast góðkendum móttakara.

Sambært grein 1 í umhvørvislógini er ikki loyt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttandura øki, og í grein 10 um burturkast stendur at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni. Og í grein 61 í ferðslulógini stendur at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 23. mai 2005, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**Miðvágs kommuna**
**og**
**Sýslumaðurin**

# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening fyri fyrra hálvár 2005 saman við kvittanum fyri goldnan barnapening, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 03.06.2005. Um goldið verður til Toll- og Skattstovu Føroya, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Umsóknir sum vera Almannastovuni í hendi innan nevndu freist verður væntandi avgreiddar í juni 2005.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til økisdeildirnar. Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barnagjald/-gjøld frá Ríkisumboðnum, ella samsvarandi útlendsk gjaldsavgerð sendast inn saman við umsóknini.

**Almannastovan**

**Økisdeildin í Tórshavn**
J. Broncksgøta 27
100 Tórshavn
Tlf. 35 35 70 - fax 35 35 71

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
Tlf. 47 47 10 - fax 47 47 11

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
Tlf. 45 72 40 - fax 45 72 41

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
Tlf. 35 35 60 - fax 35 35 61

# Ársaðalfundur

Ítróttasamband Føroya hevur ársaðalfund á Hotel Føroyum 21. mai 2005 kl. 10.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Ítróttasamband Føroya**


# ARBEIÐSMARKNAÐUR
## á www.portal.fo

Leys størv, sum verða lýst í Sosialinum, kunnu leggjast út á
www.portal.fo
so øll hava møguleikan at síggja lýsingina